deildin

Bóltfelagið 1936
Postsmoga 1136
FO-110 Tórshavn
www.b36.fo

**STOVNAÐ**
28.03.1936

**FORMAÐUR**
Kristjan á Neystabø

**MEISTARAR (8)**
1946, 1948, 1950, 15959, 1962, 1997, 2001, 2005

**STEYPAVINNARAR (5)**
1965, 1991, 2001, 2003, 2006

**GREIPUVINNARAR (1)**
2001

**Í BESTU DEILDINI**
(64 ár)
1942-1943, 1945-1984, 1986, 1988-

**Í EUROPA (11)**
Meistarakappingin 1998/99, 2002/03, 2006/07
Steypavinnar 1992/93
UEFA Cup 1999/2000, 2000/01, 2004/05, 2005/06, 2008/09
Intertoto 1997/98



Klæmint Matras er í mangar mátar ímyndin av stríðsviljanum, sum tey í B36 vilja síggja, nú felagið av álvara er farið undir eina nýggja byrjan, har lokalar kreftir eru høvuðsgrundarlagið
Mynd: Álvur Haraldsen

# B36 er stóra spurnartekinið

**Hvussu tað fer at vignast hjá árstalsfelagnum í høvuðsstaðnum valdast ikki minst, hvussu tað fer at hilnast hjá blaðungu spælararunum**

Fer B36 at spæla um heiðursmerkini, fer B36 at vera miðal lið, ella kann tað hugsast, at teir svørtu og hvítu fara at savna seg um at sleppa niðurflyting.

Spurningarnir eru nógvir, og tað er upp til nýggja liðið at gera av, hvussu teir skulu svarast. Frágongdin hevur ikki verið so ógvuliga stór, men tað sigur seg sjálvt, at holini eru stór eftir lyklaspælarar sum eitt nú verjuspælararnar Santo, Odmar Færø og Jankovic.

Ofta hevur verið undrast á, at besta B36 liðið hevur verið mannað við so nógvum spælarum, sum hava verið uppaldir í øðrum feløgum. Soleiðis verður tað ikki í ár. Fíggjarligi treingin hevur borið við sær, at tað ikki hevur verið møguleiki at knýta profilar afturat felagnum, sum tað annars hevur verið vanligt at gera.

Nýggja støðan ber við sær, at ungir spælarar, sum eru uppaldir í felagnum, kenna seg hava møguleika at stríða seg til pláss á besta liðnum, og nýggja støðan ber eisini við sær, at spælarar, sum unglingaárini spældu í B36, men sum síðani hava roynt seg aðra staðni, nú eru aftur í felagnum, sum hjartað ivaleyst altíð hevur bankað fyri.

Millum royndastu lyklaspælararnar eru Tróndur Vatnhamar, Jákup á Borg, Klæmint Matras, Herbert í Lon Jacobsen, Bergur Midjord og Magnus Olsen, sum vísti seg at hilnast heilt væl, tá ið hann eftir ikki so lítlan turbolens tíðliga í fjør flutti úr B71 og í Gundadal. Fróði Clementsen er komin aftur eftir útlegd í Sundalagnum og á Argjum, stríðsmaðurin Súni úr Hørg er komin til felagið úr VB/Sumba, og Asbjørn V. Gunnarsson og Sam Malsom hava áður víst, at tað kann roknast við teimum.

So er spurningurin, hvussu ungu menninir fara at roynast. Róaldur Jacobsen vísti longu í fjør so mikið sannførandi avrik, at hann varð kosin evnaríkasti ungi spælarin. Tíggju unglingar standa í bíðiróð at fáa møguleikan á besta liðnum. Um ungu menninir skulu fáa høvi at vísa sínar dygdir er upp til venjararnar at gera av.

Eisini á beinkinum er manningin nýggj. Milan Cimburovic, sum er ungdómsvenjari í felagnum, og sum áður í eitt stutt skifti hevur roynt seg í Runavík, hevur ábyrgdina saman við Mikkjali Thomassen, ið hevur drúgvar royndir sum spælari, men sum ongar royndir hevur sum venjari. Tað er neyvan nakað at ivast í, at venjaraparið fer at megna at flyta B36 fram frá útgangsstøðuni. Spurningurin er, hvør útgangsstøðan er.

## Hópurin hjá B36 :

**Málmenn:**
Jóan Pauli Jacobsen
Tróndur Vatnhamar (Áður spælt við HB)

**Verja:**
Bárður H. Joensen
Súni úr Hørg (VB/S)
Rúnar í Lon Jacobsen
Ásbjørn V. Gunnarsson
Herbert í Lon Jacobsen (B68)

**Álop:**
Brima Koroma
Høgni Eysturoy
Sam Malsom

**Miða/Álop:**
Bergur Midjord

Jákup á Borg (HB, OB)
Johan Ellingsgaard

**Miðvøllur:**
Uni Holm Johannesen
Poul Arni Jacobsen
Hanus Thorleifsson (Skála)
Róaldur Jacobsen
Ingi Højsted (Arsenal)
Janus Mortensen
Klæmint Matras

**Verja/Miða:**
Fróði Clementsen (EB/S, AB)
Bogi Hermansen
Magnus Olsen (B71)

**Venjari:**
Mikkjal Thomasen

**Hjálparvenjari:**
Milan Cimburvic

**Tilgongd:**
Brima Koroma
Fróði Clementsen, EB/S
Súni úr Hørg, VB/S

**Frágongd:**
Meinhardt Joensen, NSÍ
Alex Santos, EB/S
Dmitrije Jancovic, Serbia
Odmar Færø, Brøndby


